# Frágreiðing frá arbeiðinum og framtíðar ætlanir

Limafundur 2017 í missiónshúsinum í Miðvági

Gott kvøld!

Eg skal siga nakað um virksemi hjá Føroyska Bíbliufelagnum í 2016, hvat er ávegis og hvørjar ætlanir liggja fyri framman. Nú eri eg ikki komin inn í virksemi hjá felagnum fyrr enn í septembur, men vónandi er tað mesta av virkseminum komið við – annars eru tit vælkomin at taka tað upp eftir framløguna.

2016 var eitt sera hendingaríkt ár fyri Føroyska Bíbliufelagið.

Heimasíðan hjá felagnum bleiv endurnýggja í 2015, men hevur tí sítt fyrsta heila ár í 2016. Har hevur ikki verið so nógv virksemi eftir at Ábjørn legði frá sær, men høvuðstíðindi eru løgd út. Á Facebook kemur meira javnan út, men tað kann væl gerast betur. Her er UBS ein fongur, tí sera nógv og gott tilfar er atkomuligt.

Forlagið Bókin, bleiv stovna í 2015, men fyrsti fundur í forlagsnevndini var 29. februar í 2016. Fleiri verkætlanir eru í gongd, men tað er serliga NS og lutvís nýggja umsetingin hjá HHJ, sum fylla. Tó so, ein barnabíblia til smærri børn er ávegis og vantast útgivin í septembur.

11. apríl 2016 bleiv FB formelt góðkent sum limur at altjóða bíbliufelagnum UBS og er nú partur av einum felagnskapi har 118 onnur lond/bíbliufeløg eru limir. Hetta er ein viðurkenning av at vit nú eru eitt bíbliufelag sum umboðar Føroyar og vit hava ígjógnum UBS, atgongd til eitt sera stórt og dugnaligt netverk, sum vit kunna trekkja uppá, bæði til ráðgeving og til íblástur til beinleiðis verkætlanir.

Stutt eftir hálvan mai, fóru Begur og Øssur yvir til Filadelphia í USA, har amerikanska bíbliufelagið hýsti heimsstevnuni hjá UBS, í samband við at teirra felag fylti 200 ár. Heimsstevnan er 5. hvørt ár. Her blivu nýggju limirnir heiðraðir á pallinum og teir fingu samband við nógv av starvsfólkunum og limunum í UBS. Vit hava síðani haft samskifti við nøkur av hesum fólkum.

Um hetta mundi, boðaði Ásbjørn Jacobsen frá at hann av heilsuligum grundum ikki kundi halda fram sum aðalskrivari. Ásbjørn hevur verið og er framvegis, ein eldsál í Bíbliufelagnum og í Guðsríkis arbeiði sum heild, so tað var ein stórur missur at hann ikki kundi halda fram.

Í summar var so nýggja umsetingin av gamla testamenti, hjá Hans Jacob Joensen, latin BF. Hetta er stórverk sum nú er lagt úr hondum; tó eru sálmarnir ikki umsettir av nýggjum.

Í august fingu vit vitja av øllum teimum norðurlendsku aðalskrivarunum, undantikið Ísland. Hetta var ein gevandi vitjan, ið var avtala í samband við heimsstevnuna í USA. Fleiri fundir vóru á skránni, men tíð var eisini til at vísa teimum okkara vakra land. Norðanlond hava nógv í felag og kunna tí samstarva um nógv ymiskt. Her er bæði talan um tilfar og um ráðgeving í samband við verkætlanir; eisini felags stuðulsverkætlanir.

1 septembur bleiv Gunnar K Nattestad, settur sum aðalskrivari í hálva tíð. Men hann luttók tó eisini á norðurlendska aðalskrivarafundinum í august. Tað var sera gevandi at læra hesi fólk at kenna og kunna fáa so holla kunning um viðkomandi viðurskifti, sum nýsetti aðalskrivarin hevði stórt gagn av. Hetta hevur eisini komið væl við fleiri ferðir seinastu mánaðirnar.

Eitt tað fyrsta sum lá fyri, var at fáa ársins bíbliulesiætlan av bakkastokki. Við góðari hjálp frá danska Bíbliufelagnum, gekk hetta væl og ætlanin kom út góða viku fyri 1. sunnudag í advent.

Í oktober var aðalskrivarin í Íslandi í.s.v. vitjan á føroyska sjómansheiminum Ørkini. Tá var eisini høvið til at vitja aðalskrivaran í Íslendska Bíbliufelagnum. Hóast nærmastu grannar, so er stórur munur á støðuni í Íslandi og Føroyum. Tey uppliva stóra mótgongd og hava nógv minni undirtøku millum kirkjur og fólk. Vit avtalaðu at halda samskifti og stuðla hvørjum øðrum, m.a. í samband við útgávur o.l.

Nýtt upplag av tveimum bíbliuútgávum kom eisini til landið í heyst. Tað er ein munandi íløga, men tað er eisini ein fyritreyt fyri framhaldandi at fáa Bíbliuna út um alt landið og gevur eisini FB leypandi inntøkur komandi árini.

Seint í novembur, var aðalskrivarin, eisini í øðrum samanhangi, í Danmark. Har var eisini møguleiki til at vitja á danska Bíbliufelagnum og hitta aðalskrivaran. Sera áhugavert at síggja hvussu teirra stóra felag arbeiðir. Vit møta stórari vælvild frá dønum og norðanlondum sum heild, og tað stendur okkum frítt at brúka teirra tilfar. Vit gjalda tó fyri tær størru útgávurnar. Ein av teirra útgávum, ein sera listarlig barnabíblia við teknihefti, gerst møguliga veruleiki í næstum.

Gjógnum alt árið hevur BF arbeiðtt við tveimum stórum verkætlanum. Tann ið fyrst kemur út, er umsetingin av Den nye aftale, sum danska Bíbliufelagið hevur framleitt og sum Heri Tróndheim hevur umsett. Fleiri fólk hava arbeitt við at gjøgnumlesa tilfari, men tað hevur gingið missjavnt. Í byrjanin var ein bólkur, men skjótt var staðfest at tað gekk ov seint. Síðani arbeiddu trýggir bólkar við hvør sínum parta av nýggja testamenti, men her hevur eisini gingið striltið hjá fleiri. Nú tíðin til útgávan eftir avtaluni skal koma út, nærkast, var neyðugt at broyta leist. Nú eru fleiri einstaklingar settir til og tað hevur víst seg at ganga betur; vit eru tó aftanfyri tíðarætlanina. Tí er eisini neyðugt at gera skjótt av um útgávan av Nýggja Sáttmála, skal koma út hálvan oktobur, sum ætla.

Hin verkætlanin er nýggja umsetingin hjá Hans Jacob Joensen. Fróðskaparstri er í holt við nýggja testamenti, men tað gongur heldur seint.

Tí verður helst ein annar leistur lagdur fyri viðgerðina av gamla testamenti.

Ætlanir fyri 2017:

Tað eru fleiri mál fyri 2017, men serliga er tað NS sum fyllir nógv. Upprunaliga evstamarkið fyri 1. gjøgnumlestur var 1. mars, men tað er nú flutt til 1. apríl. Tað eru um 14 ólønt fólk, sum lesa tilfari ígjógnum og tað gongur nógv skjótari, men okkurt verður helst seinni enn 1. apríl. Tó, vit skula náa

málið um at fáa útgávuna út í ár. Stóra tøkk skula øll hesi og mong onnur hava fyri teirra megnar arbeiði at fáa okkara ungu og bíbliufremmandu og okkum øllum, hetta komandi nýbrotið!!!

HJJ útgávan gongur sína gongd og fer at taka nøkur ár at geva út. Hetta tilfar skal eisini gjøgnumlesast, men krøvini eru hægri enn til gerandisútgávuna, og tað er høvuðs grundin til drúgvu útgávuna.

Ein barnabíbil til smærri børn, er ávegis og væntast liðug í septembur í ár. Ein onnur barnabíbil við teknibók verður møguliga sett í gongd í vár, men her er dagur ikki settur á útgávuna.

Ætlanin er eisin at fáa eina meira støðugt virksemi á heimasíðuni og FB. Her hevur frv. Aðalskrivarin verið ein hollur stuðul og koyrur hann nøkur átøk fyri at halda fólkið til at lesa í bíblini. Ætlanin er framvegis at fáa skriftorð og smærri greinar oftari út.

Tað økta virksemi krevur eisini meira av okkum fíggjarliga. Ein hálvtíðar settur aðalskrivari kostar meira enn tann meira leysa setanin av frv. Aðalskrivara. Komandi útgávur av bíblium og bókum, koma eisini at krevja meira pening. Ætlanin er at gera meira við at fáa fleiri limi, at søkja um stuðul og gera onnur átøkk. Vit hava søkt MMR og fara at søkja onnur somuleiðis, men uttan at Harrin stýrir verkinum arbeiða smiðjirnir til einkis. Tað grundleggjandi at BF livur eftir tí orðið vit eru stovna til at breiða út, og tí er bønararbeiðið tað mest tíðandi okkara limir og onnur kunna gera.

Lat okkum halda fast við at arbeiða, men ikki gloyma at hyggja uppá hann sum hevur litið okkum uppgávuna til!

Takk fyri!

Gunnar K Nattestad